## Óegnað til meinigheitsráð

Herfyri valdu grønlendingar nýggj meinigheitsráð, men nú vísir tað seg, at fleiri av teimum valdu hava ikki valbæri og kunnu tí ikki vera í einum meinigheitsráði, skrivar Sermitsiaq. Sambært blaðnum er talan um níggju fólk, sum av ymsum orsøkum hava mist valbæri. Ein hevur dóm fyri stuldur, ein annar hevur dóm fyri svik, ein triði er dømdur fyri harðskap, og ein fjórði hevur dóm fyri at hava vanrøkt sínar sleðuhundar.



*Tað ber ikki til at velja tjóvar og svikarar í meinigheitsráð*
*Mynd: KNR*

# Eikrøtur
## – ein partur av Føroya søgu



*Høvundurin, Zacharias Wang, handaði næstformanninum í Eikgrunninum, Odd Bjellevåg, fyrsta eintakið av Eikirøtur*

**Á samkomu í gjár í Eik banka handaði Zacharias Wang Eikgrunninum bók, sum sigur søguna hjá bankanum tey 175 árini, hann hevur verið til. Talan er um eitt valaverk upp á meiri enn 450 síður**

BANKASØGA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

450 síður av bankasøgu.

Tað var úrslitið, tá Zacharias Wang í gjár handaði Odd Bjellevåg, næstformanni í Eikgrunninum 175-ára longu søguna um bankan.

Nógv fólk var komið saman í høvuðsdeildini, tá handanin fór fram og nakað seinkað bjóðaði forstjórin, Marner Jacobsen, vælkomin. Síðani greiddi hann eitt sindur frá uppgávuni, sum lá í at skriva søguna hjá bankanum frá stovnan, 24. august 1832, og fram til dagin í dag.

- Fyri trimum árum síðani, 9. mars 2005, gjørdi Eik Grunnurin avtalu við Zakarias Wang, stjórnmálafrøðing, um at skriva eitt minnisrit í sambandi við at táverandi Føroya Sparikassi, nú Eik Banki, fylti 175 ár, 24. august 2007, segði Marner Jacobsen.

Tað var í veruleikanum ein rímiliga einfaldur setningur, sum settur var fyri bókina.

- Uppgávan var at skriva eitt minnistrit uppá umleið 250 síður við teksti og myndum. Ritið skuldi fevna um søgu og menningina av Eik Banka frá tí hann var stovnaður 24. august 1832, og skuldi samstundis lýsa tann samfelagsliga týdning Eik Banki hevur havt gjøgnum tíðina, segði Marner Jacobsen.

Bókin gjørdist munandi meiri umfatandi enn roknað var við, og nakað seinkað – tó at tað var við vilja.

- Upprunaliga var ætlanin, at ritið skuldi koma út til sjálvan 175 ára dagin, men av ymsum orsøkum var hetta útsett soleiðis, at nú 9 mánaðir eftir sjálvan føðingardagin er barnið fullborið! Úrslitið gjørdist ikki 250 men 462 síður í stívari permu, sum lýsa hesi gott 175 árini fram til árslok 2007, segði Marner Jacobsen, sum síðani greiddi eitt sindur frá skránni fyri hátíðarhaldið.

### Zacharias takkar

Síðani fekk høvundurin sjálvur, Zacharias Wang, orðið og hann legði fyri við at takka fólki, sum hava havt týdning fyri útgávuna.

- Fyrsta tøkkin fer til øll tey, sum hesi 175 ár hava virkað í tí stovni, sum bókin viðger. Tað er teirra dagliga strevi fyri at takka, at vit hava hesa fyritøku og kunnu standa her í dag, segði Zacharias Wang.

Tað hevur sjálvandi stóran týdning at fáa skjøl til vega, sum lýsa byrjanina og fyrstu tíðina hjá einari so gamlari fyritøku.

- Harnæst fer tøkk mín til undangongumenn mínar sum hava arbeitt við at lýsa fyritøkuna. Fremstur teirra millum var amtsskjalavørðurin Anton Degn, sum í sambandi við 100 ára dagin hjá Færø Amts Sparekasse fann fram til ein hóp av skjølum, sum lýsa upprunan og ta fyrstu tíðina. Tíverri kom hetta tilfar ikki út tá, og tað hevði kanska nakað við tað at gera, at 100 ára dagurin var í 1932, tá tann stóra heimskreppan leikti í av tí harðasta. Tað var í hesum árum, at triði hvør banki í USA stongdi, og í sparikassanum var heldur ikki nógv veiggj. Men hetta tilfar kom til mikið gagn, tá John Davidsen skrivaði tær báðar bøkurnar sum komu út í sambandi við 125 ára dagin í 1957 og 150 ára dagin í 1982. John kendi eisini flestu av teimum fólkum, sum høvdu virkað í sparikassanum, og hevði sum havnarmaður sera góðan kunnleika til alt tað umhvørvið, ið sparikassin virkaði í, segði høvundurin.

Han takkaði eisini fyrrverandi stjórunum og øllum teimum fólkum, sum hann hevur gjørt samrøðu við. Somuleiðis takkaði hann stjórunum, Bjarna Olsen og Marner Jacobsen, eins og hann takkaði samskiparanum, Sigrún Brend.



*Forstjórin í Eik Banka, Marner Jacobse, fegnaðist um bókina*

### Ikki Zacharias av tilvild

Og høvundurin tók samanum soleiðis:

- Tað eru nú farin gott trý ár, síðani heitt varð á meg um at skriva hesa bók. Hon hevur verið mín trúfasti felagi hesa tíð, og havi eg eftir førimuni saman við góðum fólkum roynt at lýst stovnin og tað samfelag, sum hann hevur virkað í. Tann gleðiligasti dagur, sum eg havi havt í hesum verki, var tá eg fekk at vita, at fyritøkan hevði skift navn, og eisini navninum viðvíkjandi var vorðin ein banki. Tá var raðið at viðgera henda bankan sum ein partur av tí heimsumfatandi gongd, har økonomiskur vøkstur hevur broytt samfeløg okkara úr tí svarstasti armóð til dagsins vælferðarsamfeløg. Eyðsæð er, at peningastovnar hava havt stóran týdning fyri hesa gongd við at veita ta tænastu at flyta gjaldføri frá teimum, sum hava í meira lagi, til teirra sum hava tørv á gjaldføri til nýggj tiltøk. Av tí at bókin var um tað, sum er upprunin til dagsins virki, lá tað sera raðið fyri at fáa navnið til bókina, og er tað mær ein frøi í dag at handa næstformanninum í nevndini, Odd Bjellevåg, fyrsta eintakið av bókini um Føroya elstu og størstu fyritøku, bókina Eikirøtur!

Síðani handaði Zacharias Wang næstformanninum í Eikgrunninum, Odd Bjellevåg, sum takkaði Zacharias Wang fyri verkið.

- Til slíkt arbeiði er tað ein fyrimunur at vera stjørnmálafrøðingur og at vera kønir í samfelagsviðurskiftum, so tað var ikki av tilvild, at júst Zacharias Wang varð valdur at skriva søguna hjá Eik Banka, segði Odd Bjellevåg millum annað.

At enda læs Dánjal Joensen eitt brot úr bókini, nevniliga um innbrotið í Færø Amts Sparekasse í 1949, sum ongantíð varð uppklárað. Men tað gjørdi kanska ikki so nógv, tí tjóvarnir fingu ongantíð brotið peningaskápið upp.

Eikirøtur, sum bókin eitur, verður borin í hvørt hús í Føroyum í næstum.